# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Mannbjørn Tórarenni** fer av Landssjúkrahúskapellinum týsdagin klokkan 14:30. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 12 úr Skúvoyar kirkju. Í sambandi við jarðarferðina siglir Sildberin klokkan 10.30 av Sandi.
Tey, ið vilja minnast Mannbjørn kunnu lata Skúvoyar kirkju eina gávu. Konto í Føroya Sparikassa.

Kistan við **Árna Klein Olsen**, ættaður úr Vestmanna, búsitandi í Hósvík, kemur í Hósvíkar kirkju í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.
Tey, ið vilja minnast Árna kunnu lata Føroyskt Cystisk Fibrosu Felag eina gávu. Konto í peningastovnunum.

**Erling Jacobsen** úr Sørvági, ættaður av Slættanesi andaðist á Ellisheiminum mánadagin, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Magnus Louis Poulsen,** vanliga nevndur Louis í Kunoy fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi heim í Christianskirkjuna mikukvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin klokkan 13:30.
Tey, ið vilja minnast Louis kunnu lata Missiónshúsinum Emmaus eina peningagávu. Konto í Norðoya Sparikassa.

**Hjalti Næss** í Nesi í Hvalba andaðist 5. september, 72 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Elisabeth Jacobsen,** vanliga nevnd Betti, Hósvík, andaðist á Ellisheiminum í Miðvági sunnukvøldið 4. september, 89 ára gomul. Kistan fer av Ellisheiminum hóskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju fríggjadagin klokkan 14.00. Sungið verður úr sálmabókini.
Tey, ið vilja minnast Betti, kunnu lata Ellisheiminum í Miðvági eina gávu, konto í Føroya Sparikassa.

## Kvøða frá Poul Vang, Tåstup



*Poul Vang saman við familjuni, f.v.: Jacob Vang, Signe Vang, Randi Vang, Frederik Vang, Poul Vang og Henrik Carlsen. Randi er dóttir Signe og Poul Vang, og saman við Henrik Carlsen eigur hon synirnar Jacob og Frederik. Poul Vang hevur búð í Danmark seinastu 40 árini, og bert fáar ferðir hevur hann vitjað aftur í Føroyum*

Ein hjartalig heilsan til systrar mínar, Minu Wang Hansen, sum fylti 91 ár Ólavsøkuaftan og Miu Christiansen, sum fylti 83 í august 2005.
Tað var við frøði, at eg saman við familjuni var og ferðaðist í Føroyum í summar. Vit búðu í Nólsoy í tvær vikur og vitjaðu eina viku í Havn.
Vit hildu fýra føðingardagar í juli, og áhugaverdasti av teimum var óiva føðingardagurin hjá Minu. Vit vóru til kaffi og køkur á Vistarheiminum í Torfinsgøtu 47.
Vit trý systkin vóru samlaði fyri fyrstu ferð í mong ár, og hóast tað, so var tað sum sóust vit dagliga.
Nógvar søgur vóru at siga frá, bæði frá nú og frá tá vit vóru børn. Og ikki minst fortaldu vit um skemtiligar hendingar, sum vit minnast frá dagligdegnum í Nólsoy, fyri mongum árum síðani. Tað var stuttligt at flenna saman á henda hátt.
Vit upplivdu bæði sorg og gleði hesar dagarnar í Føroyum, tríggir nólsoyingar doyðu í ungum aldri og tað er altið tungt, vit bera samkenslu til tykkum sum eftur sita.
Størsta upplivingin var óiva brúdleypi hjá Leif og Anne Mette, og vit takka fyri eina ógloymandi veitslu og stóran blíðskap.
Vit takka somuleiðis øllum, sum vit hava hitt og vitja hesar dagarnar og eingin ivi er um, at familjan kemur at vitja aftur í Føroyum.

Eg vil nú nýta høvið til, at bera fram eina yrking, sum eg yrkti tá eg seinast vitjaði í Føroyum. Yrkingin er skrivað í 1986 og sigur frá eini hending, sum fór fram um jólini, tá eg sjálvur var um konfirmeringsaldur. Lítið var av mati og eingir pengar, so tað kom væl við tá menn fingu seið at selja.

**Bestu heilsanir til vinir og familju frá Poul og Signe, Randi og Henrik, Jacob og Frederik Vang.**

### *Yrking eftur Poul Vang 1986*

*Krækandi ýðan fram við klettinum smýgur*
*æðublikurin gomlu strondina prýður*
*seiður í streymkanti brestur*
*lúrandi kemur likkan, sum óboðin gestur.*
*Menn rekja nót, skulu at bøta*
*kvinnur sum áður sita og tøta.*
*Jógvan* á tanga stendur við spennig*
*í kvøld á víkini verður tað renning*
*skundar han heim, boðar við hast*
*nótina í bátin, vit royna eitt kast*
*nótin sum altíð var í standi*
*manga veiðina drigið hevur á landi*
*dragast skal inn handan fyri drangar*
*vit vóna, at metta munnarnar mangar*
*kastið var gott, 30 vóru trogini*
*frøði á monnum, hvør sendi okkum boðini*
*næsta morgun til Havnar at selja*
*um kvøldið kundu vit krónurnar telja.*
*Stúran aftur til gleði bleiv vent*
*Hann sum stýrur øllum, hevur gávuna sent.*

*Aftur skein yvir okkum miskunar sól*
*og vit kundu ynskja hvør øðrum gleðilig jól.*
*Fedrar várir árla og sýla*
*vit aldri teir gloyma,*
*undir mold teir hvíla*
*arv teirra bera við gleði*
*Harrin teir vakir á evsta degi.*

** Jógvan í Kristiansstovu*

# Tøkk



Hjartans tøkk til øll tykkum, sum vóru um meg á 75 ára føðingardegi mínum.
Takk fyri gávur, blómur og fjarrit.

**Kærar heilsur**
**Knút Nolsøe, Tvøroyri**

## Jógvan og Nikolina í Riberhúsi

**Tíðindaskriv**

Frá 8. til 28. september hava systkini Jógvan og Nikolina Kristiansen eina framsýning í Riberhúsi í Fuglafirði av blýantsteknsingum, har tey flestu av myndevnunum eru andlitsmyndir. Høvið verður at bíleggja myndir.
Fernisering verður hóskvøldið kl. 19.00 - 21.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.



*Systkini Jógvan og Nikolina Kristiansen hava eina framsýning av blýantstekningum í Riberhúsi frá 8. til 28. september*

**Dagurin**

**7. september. Robert.** Teir vita ikki, hvønn sipað verður til, navnið kemur ikki fyri í álmanakkanum fyrr enn í 1728. Kanska er talan um ein abbata í Kent í Onglandi.
Germanskt navn, samansett av orðum, ið merkja *tiltikin* og *ljómandi*.

## Lættari píkar

Á fundi mánadagin 5. september viðgjørdi landsstýrið nýggja kunngerð um nýtslu av vetrardekkum. Talan verður serliga um broytingar í reglunum viðv. stødd á píkunum
Vanligir bilar skulu nú til brúka lættari píkar. Frá mars 2006 verður ikki loyvt at marknaðarføra píkar, sum ikki eru í samsvar við nýggju reglarnar, og frá oktober 2007 verður ikki loyvt at innflyta teir.
Bjarni Djurholm landsstýrismaður sigur, at endamálið við kunngerðini er at minka um slitið á vegunum uttan at slaka upp á trygdina.
Nýggja kunngerðin verður lýst í komandi viku.